ítróttur

Nr. 177 • týsdagur • 17. september 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# KÍ bíðar eftir Kurt

**Í HB rokna teir við, at venjaraspurningurin verður avgreiddur í hesi vikuni ella í komandi viku**

VENJARAR
*Jóannes Hansen*



*Ion Geolgau er í løtuni leysur maður á føroyska venjaramarknaðinum, men skalt tú trúgva leysasøgunum, sum ganga í hesum døgum, verður hetta ikki støðan serliga leingi afturat*

HB, KÍ og NSÍ eru trý tey fremstu í bestu deildini. Tað er greitt, at Jógvan Martin Olsen verður venjari hjá NSÍ komandi ár. Men tað er ikki greitt, hvørjir verða venjarar hjá HB og KÍ.

Klaksvíkingar ynskja ikki at dylja, hvønn teir fegnir vilja hava at vera venjara hjá teirra monnum, meðan tað er torførari at fáa staðfest, hvønn HB leiðslan ynskir at hava ábyrgdina fyri teirra besta lið.

– Vit vilja fegnir hava, at Kurt Mørkøre heldur fram í venjarastarvinum. Hann hevur víst, at hann megnar at stíla fyri góðari venjing. Spælararnir eru í góðari venjingarstøðu, og umhvørvið á og kring liðið er gott. Tað eru nógvir um boðið á besta liðnum, og teir á beinkinum vísa aftur og aftur, at teir gera heilt stóran mun. Tað sóu vit aftur í Gundadali sunnudagin. Tá tað eru nógvir um boðið, og allir ikki sleppa upp í part, so er tað uppgávan hjá venjaranum at halda øllum til, og at syrgja fyri at lagið er gott, og tað hevur Kurt megnað sera væl, sigur Gestur Hovgaard, sum er formaður í KÍ.

Okkum eydnaðist ikki at fáa fatur á Kurt Mørkøre í gjár, men vit skilja, at orsøkin til at hann ikki enn hevur givið endalig boð, um hann fer at halda fram í Klaksvík ella ikki, er, um hann verður búgvandi í Føroyum, ella um hann fer aftur til Noregs.

## Hoyra einki

KÍ formaðurin ásannar, at støðan kann gerast eitt sindur torfør, um teir ikki hava sett venjara, tá tíðin er liðin nógv frá, men hann væntar ikki, at hetta fer at bila hjá KÍ:

– Vit halda okkum vera í einum góðum og spennandi felag, sum tað átti at verið spennandi at vant. Ikki minst tí vit hava nógvar og góðar spælarar.

*Fáa tit nógvar fyrispurningar?*

– Síðani eg gjørdist formaður hevur eingin venjari spurt seg fyri um starv hjá okkum. Hvørki úr Føroyum ella útlendingur. Kanska er tað tí, at vit hava ein góðan venjara, eg veit tað ikki. Men eg haldi, at tað hevði ikki gjørt nakað, um venjarar góvu seg til kennar, um teir eru áhugaðir. Tað hevði gørt uppgávuna lættari hjá øllum pørtum, heldur KÍ formaðurin Gestur Hovgaard.

## Frætta nógv

Í HB tosa teir nógv um venjingina komandi ár. Kári Nielsen og Jóannes Jakobsen hava havt ábyrgdina, síðani Ion Geolgau fór úr starvinum, sum hann hevði havt síðani 1998.

Tá vit spyrja Steinfinn Mittelstein, stjóran í Havnar Fótbóltur, sum helt 41 ára føðingardag í Runavík sunnudagin, um, hvussu tað verður við venjaranum, vil hann hvørki avsanna ella vátta, at menninir, sum nú hava ábyrgdina, fara at halda fram.

– Kári og Jóannes tóku uppgávuna á seg, tá tað stóð ikki so væl til. Teir eru settir til hetta árið er liðugt. Venjaraspurningurin fyri komandi ár verður avgreiddur í hesi vikuni ella í næstu viku, sigur Steinfinn Mittelstein.

*Fáa tit nógvar fyrispurningar?*

– Tað eru fleiri, sum føla seg fyri hjá okkum. Ikki minst úr útlandinum koma ofta teldupostir frá venjarum, sum siga seg hugaðar at koma henda vegin. Tá tað í fjør varð eitt sindur av turbolensi kring HB og venjaran, fekk eg fleiri teldubrøv, sigur Steinfinn Mittelstein.

## VB leitar

Í Vági er Marek spælandi venjari. Tá vit spyrja John Henrik Holm, formann í VB, hvussu tað verður komandi ár, svarar hann soleiðis:

- Vit søkja í løtuni eftir venjara, og sjálvandi er tað ein spurningur, sum vit vilja hava avklárað sum skjótast, men enn er ov tíðliga at siga nakað um hetta.

*Er VB eitt av feløgunum, sum hevur roynt at fáa Ion Geolgau til venjara?*

– Eg fari ikki at seta nøvn á, hvørjar venjarar vit hava havt samband við. Vit hava tosað við 3–4 persónar, men vit hava ikki verið í realitetssamráðingum við nakran, sigur VB formaðurin.

# Trygvi heldur ikki fram á Eiði

**Á Skála ætla teir ikki at seta venjara, fyrrenn tað er greitt, um teir skulu spæla í bestu ella næstbestu deildini komandi ár**

VENJARAR
*Jóannes Hansen*
*og Jákup Mørk*

Nú er tað greitt, at EB/-Streymur skal hava nýggjan venjara komandi kappingarárár. Trygvi Mortensen hevur havt ábyrgdina í ár, men hann heldur ikki fram:

– Tað er eitt sindur síðani, at eg segði leiðsluni í felagnum frá, at eg fór ikki at halda fram. Tað gjørdi eg fyri at teir skuldu hava stundir fyri at finna ein nýggjan venjara í góðari tíð, sigur Trygvi Mortensen, sum orsaka av arbeiðsumstøðum ikki hevur ætlanir um at vera venjari á høgum støði komandi ár.

Í EB/Streymi hava teir ikki enn sett nýggjan venjara til komandi kappingarár, sum ivaleyst – triðja árið á rað – verður í bestu deildini.

## Bíða á Skála

Á Skála komu teir flúgvandi frá fyrsta dystinum, eftir at Hans Jákup Andreasen fór frá at vera hjálparvenjari og til at hava ábyrgdina, og Jústinus Justinussen gjørdist hjálparvenjari – akkurát sum hann gjørdist í fjør, tá tað stóð mest á.

*Ætla tit at halda fram við somu venjarum?*

Kurt Rasmussen er formaður í Skála Ítróttarfelag:

– Vit hava onga avgerð tikið um venjaran. Sjálvandi hava vit følt okkum eitt sindur fyri, og vit fylgja við í, hvat gongur fyri seg. Men vit fara ikki at seta venjara, fyrrenn tað er greitt, um vit skulu spæla í 1. ella í 2. deild. Tað verður í fyrsta lagið eftir TB dystin, sum verður á skránni um tvær vikur. Tá fæst at síggja, um vit skulu flyta beinleiðis niður, ella um vit skulu spæla um eitt pláss í bestu deildini, sigur Kurt Rasmussen, sum eftir sigurin og góða avrikið sunnudagin sigur seg hava gott mót um, at tað fer at eydnast hansara monnum at varðveita plássið í bestu deildini.

*Hví halda tit ikki bara fram við venjaraparinum, sum tit nú hava?*

– Sum eg segði, so er einki avgjørt. Men ofta vísir tað seg hjá monnum, sum eru í fulltíðarstarvi, at tað verður ov tungt at hava venjarastarvið framíhjá, sigur Kurt Rasmussen, formaður í Skála Ítróttarfelag.





# HB hevur nú undanbrekku ímóti FM

**Mótbrekkan hjá TB tykist so tung, at tað verður sera torført hjá tvørámonnum at varðveita plássið í bestu deildini**

SAMANUM
15. UMFAR
*Jóannes Hansen*



*Nocko Jokovic og HB tóku sunnudagin eitt risa fet móti gullkrónunum. Enn resta trý umfør, men við eftirverandi dystarskránni er ilt at ímynda sær, at havnarliðið skal kiksa í royndini at vinna sítt 14. meistaraheiti*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað eru trý umfør eftir av 2002 kappingarárinum. Tað er tætt millum fremstu liðini, og tí er einki avgjørt. Men nú skal tað vilja meiri enn illa til hjá HB, um teir ikki fara at vinna FM heitið, sum teir ikki hava átt síðani 1998.

HB er eitt stig frammanfyri KÍ og NSÍ. Í innanhýsis uppgerðunum – har eru tað bara stigini og ikki málini, sum telja – stendur á jøvnum millum HB og KÍ, meðan HB er omaná ímóti NSÍ. HB vann 4–0 á heimavølli í fyrsta umfarinum, og sunnudagin vunnu teir 2–0 í Runavík.

Hóast EB/Streymur vann 2–1 á heimavølli ímóti HB, so ber ikki til at ímynda sær, at HB fer at tveita stig burtur, tá teir komandi sunnudag fáa vitjan av Skála, og tá EB/Streymur annan sunnudag kemur í Gundadal. Avrikið ímóti NSÍ vísti, at oddaliðið leikliga er væl fyri, um mótstøðuliðið ikki liggur heilt tætt í teimum. Tað megnaði NSÍ í fyrra umfarinum, men tað hava hvørki Skála ella EB/Streymur møguleika at gera. Í síðsta umfarinum skal HB suður á Sevmýri, og har fara teir heldur ikki at missa stig.

Úrslitini sunnudagin lagaðu tað soleiðis, at HB hevur ráð at spæla javnt í einum av teimum trimum dystunum, sum teir eiga á. Teir eru tvey stig undan KÍ og NSÍ, teir hava betri málmun enn KÍ, og teir eru omaná ímóti NSÍ – bæði í innanhýsis dystum og málmuni.

## Torført við skránni

Um eitt lið er á odda og samstundis eigur á pappírinum so lættar uppgávur á, sum HB nú ger tað, so vil tað sjálvsagt siga, at teir longu hava megnað torføru uppgávurnar ímóti hinum góðu liðunum.

Hjá svornum HB viðhaldsfólkum er tað sjálvandi hugaligt, at meistaraskapsdeymurin longu eftir fimtanda umfarið er so ramur. Men fyri spenningin og harvið áhugan yvirhøvur fyri kappingini, er tað harmuligt, at oddaliðið ikki í trimum teimum seinastu umførunum verður partur í toppuppgerðum.

Í hondbóltinum verður lagt soleiðis til rættis, at tey fýra liðini, sum í undanfarna kappingarári endaðu á fýra teimum ovastu plássunum, í seinastu umførunum hittast innanhýsis. Harvið verður á skrivaraborðinum gjørt tað, sum gerast kann, fyri at varðveita intensitetin og spenningin so leingi, sum tað ber til.

Í gomlum døgum – og tað vil í hesum førinum siga í tíðini, áðrenn Eysturoyggin rættuliga fór at blanda seg í toppin í fótbóltinum – var skráin oftast soleiðis, at KÍ og HB hittust fram ímóti kappingarenda ella HB og TB, tá tað vóru hesi bæði liðini, sum undanfarna árið høvdu verði ovast.

Teir, sum leggja fótbóltskappingina til rættis, tykjast ikki at hava hugsað soleiðis, tá teir í síðsta umfarinum hava sett TB og HB at spæla á Sevmýri, men uppgávan bæði at at leggja til rættis og at vera spámaður, sum metir um, hvør fer at standa seg væl og minni væl, er stór og torfør.

Í fjør vann B36 FM heitið. GÍ var næstfremst, so komu B68 og VB, og NSÍ, KÍ og HB, sum seinastu vikurnar hava telvast um fremsta plássið, vóru ávikavíst nummar fimm, seks og sjey!

Undan kappingarbyrjan í ár varð HB mett sum eitt av fleiri boðum uppá oddasessin. Onnur boð vóru NSÍ, KÍ, B36, GÍ og B68. Hesi feløgini skulu spæla fleiri innanhýsis dystir í trimum teimum seinastu umførunum.

## Europa upp á spæl

Meistaraliðið fær eina stóra millión frá UEFA fyri at luttaka í Europa Cup. Steypavinnararnir eiga pláss í UEFA Cup. Tað plássið hevur NSÍ tryggjað sær. Næstfremsta liðið sleppur eisini upp í part í UEFA Cup. Í løtuni er KÍ besta boðið upp á hetta plássið.

Størstu hóttanina fáa teir úr Gøtu. GÍ er kropið upp á fjórða plássið. Teir eru tvey stig aftanfyri KÍ og NSÍ. Komandi sunnudag fara gøtumenn til Klaksvíkar. Úrslitið í tí uppgerðini fer at hava sera stóran týdning fyri UEFA Cup luttøkuna.

Sum støðan er í løtuni, so verður neyðugt hjá GÍ at vinna í Klaksvík. Men tað eru framvegis fleiri aðrar spennandi uppgerðir á skránni. Í næstsíðsta umfarinum skal B36 til Gøtu, og í síðsta umfarinum skal NSÍ til Klaksvíkar. Undan vikuskiftinum var møguleiki fyri, at hesin síðst nevndi dysturin skuldi gerast ein sonn finala. Tann møguleikin er rættuliga kámur nú. Hann spøkir, men um hann skal gerast veruleiki, so skal HB snáva orduliga, og so skulu KÍ og NSÍ vinna báðar dystirnar, sum tey eiga, áðrenn tey í síðsta umfarinum hittast í Klaksvík.

## Mótbrekkan hjá TB

Sunnudagurin var søguligur hjá Skála á tann hátt, at tað fyri fyrstu ferð eydnaðist teimum at vinna í bestu deildini. Og nýggi venjarin, Hans Jákup Andreasen, kann erpa sær av, at liðið bara hevur vunnið í 1. deild, meðan hann hevur verið venjari!

Tey trý stigini, sum Skála fekk burturúr ímóti EB/-Streymi, bera við sær, at Skála er sloppið undan aftasta plássinum og harvið beinleiðis niðurflytingar plássinum. Tá Skála komandi sunnudag fer í Gundadal at spæla ímóti HB, fer TB at spæla á heimavølli ímóti NSÍ. Tað er sannlíkt, at hvørki botnliðið fer at fáa úrtøku. Um tað fer at gangast, sum tað kann roknast við, so verður niðurflytingin avgjørd, tá tey bæði botnliðini í næstsíðsta umfarinum fara at hittast á Skála. Í løtuni sær tað út til, at tað verður neyðugt hjá TB at vinna tann dystin, um teir skulu sleppa undan beinleiðis niðurflytingini.

Um tað ikki eydnast hjá TB, so verður støðan ivaleyst tann sama eftir síðsta umfarið, sum hon var í 1988. Tá fekk HB handað gullmerkini og FM steypið, meðan tvørámenn stóðu og hugdu at í Gundadali. Teir vóru greiðir yvir, at teir í 1989 skuldu spæla í 2. deild. Aftur í 1996 vóru tvørámenn í somu støðu. Tá stóðu teir eftir síðsta umfarið niðurfluttir á Svemýri og hugdu at, meðan gøtumenn fingu gullkrónur og FM steyp.

## Óvanliga spennandi

Í 2. deild er tað so spennandi, sum tað ongantíð hevur verið áður. Spurningurin um beinleiðis uppflyting er avgreiddur. FS Vágar hevur vunnið deildina so sannførandi, sum eingin hevur gjørt áður. Spenningurin snýr seg um endaspæl um uppflyting, um endaspæl um niðurflyting og um beinleiðis niðurflytingina.

Síðsta umfarið í 2. deild verður um tvær vikur. Tá verður greitt, um talan yvirhøvur verður um endaspæl um uppflyting. Treytin er, at eitt felag, sum ikki frammanundan er umboðað í fermstu deildini, verður í hvussu so er nummar fýra. B71, Sumba, ÍF og LÍF kappast innanhýsis. Men tað er framvegis møguleiki fyri, at B36, KÍ og NSÍ fara at liggja á teimum øllum.

Tað er ikki komið fyri áður, at átjan stig ikki hava verið nóg stór úrtøka fyri at sleppa undan beinleiðis niðurflytingini. Soleiðis er støðan hesa ferð. Burtursæð frá FS Vágum eru øll hini níggju liðini í størri ella minni vanda fyri at flyta niður. Frá HB á aftasta plássinum og fram til B36 á silvurplássinum eru tað fimm stig, og tað eru tvey umfør eftir at spæla. Í tveimum teimum síðstu umførunum sær skráin soleiðis út: LÍF–B71, NSÍ–B36, FS Vágar-Sumba, HB–ÍF og VB–KÍ hittast komandi leygardag. Annan leygardag hittast B71–VB, B36–LÍF, Sumba–NSÍ, ÍF–FS Vágar og KÍ–HB.